# Kreditt-trygging avbjóðing hjá norskum útflytarum

Hóast fíggjarkreppan herjar, selur norskur sjómatur væl. Kortini merkir vinnan nú, at tað er ilt at fáa til vega keyparatryggingar. Sverre Søraa frá fyritøkuni Coast sigur, at tað tyngstu marknaðirnir í løtuni eru í Eysturevropa, serliga Ukraina, og Korea. Vinnuhúsið skrivar, at stjórin fyri marknaðardeildina í Eksportutvalget for Fisk (EFF), Egil Ove Sundberd, sigur eisini, at tey nú fáa frágreiðingar frá marknaðinum og frá útflytarunum, at fíggjarkreppan ávirkar gjaldsevnini og tryggingarnar hjá keyparum. Eftirspurningurin eftir sjómati er tann sami, men tað merkist, at handilsvinnan og veitararnir til marknaðin hava gjaldføris- og tryggingartrupulleikar. Hetta er tó serliga galdandi í Eysturevropa, meðan tey vestanfyri eru hava somu trupulleikar.

# Nýggjur bankapakki fyri jól

Danska stjórnin boðar frá, at bráðneyðugur tørvur er á einum nýggjum bankapakka. Ætlanin er, at staturin skal skjóta stórar upphæddir inn í fíggjarsektorin. Hetta sigur Vinnuhúsið, sum áður hevur víst á trupulleikarnar við at fáa fígging til vinnuvirksemi og nýggjar íløgur, umframt at útflutningsvinnan missir tryggingar uppá keyparar í Evropa. Í eini samrøðu við blaðið "Børsen" rópar Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, fíggingartrupulleikarna fyri: "ta mest átrokandi avbjóðingina hjá danska búskapinum í løtuni". Hann heldur, at stjórnin og danski fíggjarsektorurin bert hava fáar vikur at loysa trupulleikan í.



- Fólk gloyma so skjótt, og eg trúgvi, at tá vit koma út á várið, hava mong longu gloymt, hvussu trupult tað var, meðan oljuprísirnir vóru í hæddini. Men hetta hevur virkuliga verið ein trupul tíð, sigur Marner Lisberg, reiðari

Mynd: Vilmund Jacobsen



- Tað er ikki rávørugrundarlag undir báðum virkjunum í Sandoynni í løtuni, sigur Marner Lisberg

# Stendur upp og niður í Sandoy

**- Høvdu vit havt arbeitt meira fisk, hevði úrslitið eisini verið betri í ár. Tá tú virkar upsa, skal ein ávís nøgd til av fiski fyri, at framleiðslan skal geva avkast, sigur nevndarformaðurin í Sandoy Seafood**

VIRKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Marner Lisberg, reiðari, er eisini nevndarformaður í Sandoy Seafood, har virksemi bert er á fiskavirkinum í Skopun.

- Tað er ikki rávørugrundarlag undir báðum virkjunum í løtuni. Virkið á Sandi hevur verið brúkt til virking av saltfiski, men grundarlag er ikki undir at virka saltfisk úr upsa, og toski er lítið av, samstundis sum hann er eftirspurdur á marknaðinum.

Um gongdina hjá Sandoy Seafood í hesum árinum, sigur nevndarformaðurin, at árið fíggjarliga hevur staðið so nøkulunda upp og niður.

- Høvdu vit havt arbeitt meira fisk, hevði úrslitið eisini verið betri í ár, tí tá tú virkar upsa, skal ein ávís nøgd til av fiski fyri, at framleiðslan skal geva avkast, sigur Marner.

Hóast framleiðslan er í Skopun, er virkið á Sandi ikki púrasta afturlatið. Fiskurin, sum verður landaður í oynni, verður lagdur upp á Sandi og koyrdur norður til Skopunar. Virkið á Sandi virkar tískil sum móttøka hjá Sandoy Seafood.

## Batar í væntu

Nevndarformaðurin vísir á, at nú fíggjarkreppa rakti tað mesta av heiminum, hevur at kalla øll vinna, sum hevur við sjógvin at gera, í størri og minni mun eisini verið rakt.

- Vit hava tó roynt at skipa fyri sum best, og við góðari hjálp frá fíggingarstovnum, leverandørum, arbeiðsfólki og fiskimonnum hevur eydnast okkum at hóra undan. Einasti máti at tjena pening í vinnuni er at vera virkin – at vera úti og fiska og virka á landi, sigur hann.

## Væntar uppgongd

Marner Lisberg heldur ikki, at tað sær verri út í løtuni, enn tað gjørdi, tá árið 2009 var hálvrunnið.

- Tað eru tekin um, at vit fara at fáa eina uppgongd í fiskiveiðini, sum tíðin líður. Fiskimenn lata ikki illa at og halda, at tekin eru um batar í havumhvørvinum, sigur hann.

broyttu útlendingalógina í summar, hevur í heyst eydnast okkum at mannað Hoyvíking aftur.

Reiðarin sigur, at nú er Hoyvíkingur mannaður við fólki úr Suðuroy og fýra litavum. Skipari er Jákup Lisberg, sum er ættaður av Økrum.

- Skipið fór í vinnu aftur í oktober. Fyrsti túrurin var undir Føroyum, og tað víst seg, at skipið riggaði væl, sjálvt um Hoyvíkingur hevur ligið alla hesa tíðina. Næsti túrur var til Íslands, og hetta gekk væl, til skipið var á veg heimaftur og var komið í føroyskan sjógv. Tá fekk Hoyvíkingur maskinskaða og varð sleipaður á Havnina, har skipið nú hevur ligið í einar 14 dagar, meðan motorurin verður umvældur.

Marner heldur, at teir í hesum førinum hava verið óhepnir við motorinum, sum annars er rættiliga nýggjur – frá 2006.

- Vit hava sum nevnt eisini havt trupulleikar við at fingið manning til Kúrberg. Men hetta hevur nú eydnast, og verður skipið rikið úr Sandoynni, haðani tað eisini er mannað við 4-5 monnum. Skipari er Klæmint Nicodemussen, og Kúrberg fer ætlandi at leggja veiðina upp til Sandoy Seafood.